Úti í Nólsoy:

# Eigur kanónkúlur hjá Brillumanninum

**93-ára gamli Richard Jacobsen er helst tann mest áhugaverdi maðurin, sum eg nakrantíð havi møtt. So greiður er ein nólsoyingur á máli, tá Sosialurin kemur út til Nólsoyar henda frálíka várdag, nú talan fellur á Richard Jacobsen, bónda í Nólsoy**

SØGA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



*Ein ávís Atoniusdatter úr Nólsoy skuldi giftast, so mamman og hon fóru til Havnar at keypa klæði til brúðleypið. Tær keypa eina kistu við brotnum loki at leggja klæðini í og fóru so aftur til Nólsoyar, spentar upp á brúðleypið, sigur Richard um, hvussu kistan við kanónkúlunum kom út til oynna*

Men hví siga nólsoyingar, at hesin maðurin er ein tann mest áhugaverdi, teir hava møtt?

– Hann eigur tvær kanónkúlur, sum Brillumaðurin skeyt inn á Tinganes fyri tvey hundrað árum síðani, fortelja nólsoyingar.

Næsti spurningurin hjá blaðmanninum er uppfylgjandi og leitandi eftir møguligari stórsøgu:

– Eru hesar kanónkúlurnar tær einastu í Føroyum?

Tað vita nólsoyingar ikki á standandi fóti, men teir halda, at hetta er vert hjá blaðmanninum at kanna. Blaðmaðurin hevur longu tikið støðu til, at her mann okkurt vera við áhuga fyri allar føroyingar.

Klokkan er fimm seinnapartin, og vit hava verið í Nólsoy í minni enn ein tíma. Ein samrøða við tann áhugaverda Richard Jacobsen er fingin í lag, men áðrenn tað fara vit at eta nátturða og ein túr á ta kendu Kaffistovuna.

Seinni um kvøldið, klokkan níggju, eru vit bodnir inn í Kongsstovuna. Her býr tann 93-ára gamli Richard Jacobsen, sum sambært nólsoyingum liggur inni við áhugaverdum skatti.

Vit banka upp á dyrnar, og Richard Jacobsen tekur ímóti. Hann er bæði blíður, róligur, og vælgongdur maður, glaður fyri at fáa vitjan.

Vit seta okkum inn í stovuna, har eitt stórt og stásiligt bornholmara-ur stendur í krókinum. Richard býður okkum sess, og vit seta bandupptakaran í gongd og fregnast um kanónkúlurnar.

– Eg havi tvær kanónkúlur uppi á loftinum, sum vóru skotnar inn á Havnina fyri einum tvey hundrað árum síðani, sigur Richard, glaður fyri at fortelja, og hann bíðar tolin eftir næsta spurningi.

Vit hugsa við okkum sjálvum, at tað hevði ikki verið av vegnum at sloppið at sæð hesar kanónkúlurnar.

– Skal eg fara eftir teimum, spyr Richard eftir at tað hevði verið tøgn eina løtu, meðan menn hugsaðu um hesar góðu kúlur.

Og so fer Richard, við sínum 93 árum, hóvliga til gongu upp á loftið eftir tí, sum vit eru komnir fyri at práta um. Tað gongur ikki meir enn ein løta, so er Richard aftur í stovuni, hesuferð við eini kanónkúlu í hvør síni hond.

– Hetta eru tær. Hesar báðar kanónkúlurnar skeyt tann tiltikni Brillumaðurin inn ímóti Tinganes, tá hann í 1808 rændi Havnina, sigur Richard um hesar søguligu kúlur, sum hann hevur liggjandi.

Spurningurin er so, hví kúlurnar eru endaðar úti í Nólsoy í Kongsstovu hjá Richard Jacobsen. Tá sigur Richard, meðan hann peikar á eina kistu aftan fyri okkum, at kúlurnar komu til oynna í hasi kistuni.

– Men fólkini vistu ikki av, at tvær kanónkúlur vóru í kistuni, tá tey sigldu til Nólsoyar við henni, sigur Richard flennandi.

– Tað bar soleiðis til, at ein kista stóð á loftinum í Tinganesi í 1808, tá Brillumaðurin leyp á Havnina. Kanónkúlur vóru skotnar inn ímóti Tinganesi, og ikki minni enn tvær av hesum kanónkúlunum eru dotnar niður ígjøgnum takið og ígjøgnum lokið á kistuni, har tær síðani vóru liggjandi, sigur Richard.

– Seinni í árinum hendi so tað, at ein Atoniusdatter úr Nólsoy skuldi giftast. Mamman og hon fóru tískil til Havnar at keypa klæði til brúðleypið. Tær keypa eina kistu við brotnum loki at leggja klæðini í og fóru so aftur til Nólsoyar, spentar upp á brúðleypið, fortelur Richard, um hvussu kistan kom út til oynna.

– Fólk sóu sjálvandi, at lokið var brotið, men tað sum tey ikki vistu, var, at tvær kanónkúlur lógu á botni í kistuni, sigur Richard smílandi.

Komin út til Nólsoyar verður kistan førd til familjuhúsini, Kongsstovuna, og har hevur kistan so staðið hesi seinastu knapt tvey hundrað árini síðani 1808. Kistan hevur verið í familjuni hjá Richard Jacobsen alla hesa tíðina, og tískil eru kistan og kanónkúlurnar ein partur av familjusøguni hjá Richard.

93-ára gamli Richard dylir ikki fyri, at hann er errin av kistuni og kanónkúlunum hjá Brillumanninum. Hann sigur seg ikki vita, hvussu nógv tær eru verdar, men sigur bert í hesum sambandi, at tær verða verandi í familjuni.

– Nei, eg fari ikki at selja kanónkúlurnar, tað ætlaði eg so vist ikki, svarar Richard læandi til spurningin um prís og sølu.

Spurdur um fólk ikki hava undrast á hesar kanónkúlurnar fyrr, og um tær ikki hava verið nevndar í fjølmiðlunum, sigur Richard Jacobsen, at onki tílíkt hóvasták hevur verið burtur úr kistuni og kúlunum.

- Hetta hevur ikki verið í bløðunum fyrr. Ongin tíðindamaður hevur verið og fregnast. Tað var ikki fyrr enn tú komst út til Nólsoyar at práta, sigur Richard.

Tað er óvist, um hesar kanónkúlurnar hjá Brillumanninum eru tær einastu í Føroyum, ella um fleiri av slagnum finnast onkustaðni. Brillumaðurin var bretskur kapari, sum rændi handilin í Havnini í árinum 1808, og sum eisini legði ymsar slóðir eftir sær, millum annað kanónkúlurnar.

Onkur nólsoyingur er tó bráður á máli, tá spurt verður, um hetta munnu vera tær einastu í Føroyum.

– Hetta eru helst tær einastu í allari verðini, siga teir við einum smíli.

Tað kann hugsast, at onkur føroyingur, sum situr har úti, hevur onkrar rundar loyvdir frá Brillumanninum liggjandi á loftinum, sum viðkomandi hevur hug at vísa fram. Ella kanska er onkur serkønur har úti, sum hevur fingið íblástur til eitt fitt petti av gransking um tvey hundrað ára gamlar kanónkúlur.

Men inntil tá eru tað kanónkúlurnar hjá Richard Jacobsen úti í Nólsoy, sum eiga heiðurin sum tær einastu, ið menn vita um.



*Hesar báðar kanónkúlurnar skeyt tann tiltikni Brillumaðurin inn ímóti Tinganes, tá hann í 1808 rændi Havnina, sigur Richard Jacobsen um hesar søguligu kúlur, sum hann hevur liggjandi*



# Handilsmiðstøð í bíðistøðu

**Longi hevur verið tosað um ætlaðu handilsmiðstøðina í Klaksvík, men tað hevur verið sera torført at fáa nakað at ítøkiligt at vita um ætlanina. Sum Sosialurin skilir, tekur fyrireikingararbeiðið nógva tíð, tí verkætlanin er so umfatandi**

HANDILSMIÐSTØÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Ein tekning yvir hvussu økið við Sandin í Klaksvík fer at sígga út, tá handilsmiðstøðin er liðug*
*Tekning: Kl. býráð*

**Klaksvík:** Verkætlanin við handilsmiðstøðini er ikki ein kommunal verkætlan. Tað eru privatpersónar, sum eru í gongd við hana. Privatpersónar, sum eru sera varnir við at úttala seg, tí nógvir leysir endar eru enn.

Sum skilst, so hevur felagið fingið trý tilboð upp á verkætlanina. Eitt av teimum tilboðunum var ov høgt, meðan tvey av teimum sita teir og arbeiða við. Hetta tekur nakað av tíð, tí spurningar skulu setast viðvíkjandi tilboðunum, og tað skulu tilboðsgevararnir eisini hava stundir til at arbeiða við.

Við síðuna av hesum verður eisini arbeitt við at finna íleggjarar og fígging til verkætlanina, sum, tá alt verður tikið við, verður mett at koma at kosta um 100 milliónir krónur.

### Trý stig

Verkætlanin koyrir í løtuni í trimum stigum. Fyri góðari viku síðani varð umsókn send inn um fígging, leitað verður eftir íleggjarum og tilboðini kannað, samstundis sum leigarar til miðstøðina eisini skulu finnast.

Handilsmiðstøðin skal standa við Sandin, har eini 100.000 rúmmetrar av gróti skulu fyllast í, áðrenn sjálv byggingin av miðstøðini kann byrja. Hetta arbeiðið fer væntandi í gongd um einar tveir mánaðir.

Gongur hetta, sum tað skal, so verður klárt at byggja har einaferð í september, sum borgarstjórin Steinbjørn Jacobsen hevur skilt.

Nógvar verkætlanir liggja fyri framman í Klaksvík nú undirsjóvartunnilin av sonnum fer í gongd. Týsdagin verður so full styrki sett á arbeiðið, tá fyrsta skotið borðoyarmegin verður latið av.

Tað allarfyrsta grótið, sum kemur úr tunlinum fer til arbeiðsøkið uppi við bátahylin í Borðoyavík. Síðani skal nakað av grótið út um Norðborg, har eitt øki til bingjur og bygningar skal gerast.

Síðani verður farið í holt við miðbýin og økið har, handilsmiðstøðin skal standa.

### Tíðarneyð

Borgarstjórin sigur, at meðan fylt verður við bátahylin og uttan fyri Norðborg, fer kommunan í gongd við at taka upp við Sandin, soleiðis at tað verður klárt at fylla í, tá hitt er liðugt. Og hann ásannar, at tað er við nakað av tíðarneyð, at alt hetta fer í gongd.

– Men árstíðin til at flyta grót og gera alt hetta arbeiði er við okkum, og so er bara at vóna, at aðrar forðingar ikki fara at verða. Tí um handilsmiðstøðin skal verða veruleiki, tá tunnilin verður liðugur, so má og skal tað helst farast í gongd við byggiarbeiðið so skjótt sum tilber, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Um hetta fer at eydnast, ber ikki til at siga í dag. Men veruleikin er so hann, at týsdagin verður fyrsta skotið borðoyarmegin latið av, samstundis sum handilsmiðstøðin er í einari bíðistøðu. Og so er spurningurin, um fígging verður latin, um alt grótið er komið uppá pláss við Sandin og um alt annað fellur upp á pláss viðvíkjandi hesi verkætlan í nóg góðari tíð.

# Eysturoyar gongufelag 2004

TÍÐINDASKRIV

Aftur í ár skipar Eysturoyar gongufelag fyri túrum ymsastaðni í Føroyum. Túrarnir í ár verða fjølbroyttir, bæði léttir og tungir. Á skránni eru umleið 2 túrar um mánaðin.

Byrjað varð longu hin 21. mars við einum spákingartúri í Gøtu, har gingið varð úr Syðrugøtu til Norðragøtu. Við á hesum fyrsta túrinum vóru umleið 70 fólk.

Limatalið í Gongufelagnum er umleið 150 húski, og øll kunnu gerast limir við at venda sær til eina av kunningarstovunum í oynni.



*Gongufelagið er bæði fyri yngri og eldri*
*Tikið myndina hevur: Óli Simonsen*

Næsti túrurin í ár verður komandi sunnudag 18. apríl. Hetta er ein léttur spákingartúrur á Strondum. Hilmar Kass verður frásøgumaður. Aftaná túrin verður ein kaffimunnur at fáa í Bygdarhúsinum á Strondum. Henda dagin møtast gongufólkini kl. 14.00 á Hulki. Tey, sum eru áhugaði at gerast limir, kunnu eisini møta, og tekna seg á staðnum.

Faldari um túrarnar kann fáast við at venda sær til Kunningarstovurnar í oynni:

Kunningarstovan í Fuglafirði, tlf.444860
t-postur: infoey-f@post.olivant.fo

Kunningarstovan í Runavík tlf. 449449
t-postur: infoey-r@post.olivant.fo